# »Hey góði...« nýtt átak hjá Ferðslutrygd

**Fríggjadagin 9. mars var tíðindafundur hjá Ferðslutrygd í sambandi við eitt nýtt átak fyri at fáa ungar dreingir at vera meira ansnar í ferðsluni. Eisini var eftirmeting av skeiðum fyri skúlanæmingum, sum hava verið seinastu 10 árini**

FERÐSLA

*Magnus Gunnarsson*
*maggi@sosialurin.fo*

Ferðslutrygd kemur nú við einum átaki fyri at fáa ungar dreingir at vera meira ansnar í ferðsluni. Í sambandi við átakið eru "jinglur" gjørdar at senda í útvarpi, har vit hoyra genturøddir biðja dreingir ansa sær í ferðsluni. Átta ymiskar "jinglur" eru gjørdar, og teksturin verður eisini at síggja í bløðunum, saman við mynd av gentunum.

Á tíðindafundinum greiddi Jákup Veyhe, lýsingarmaður, frá um konseptið í átakinum.

Ferðslutrygd hátíðarhelt eisini, at 10 ár eru liðin síðan fyrstu ferð varð skipað fyri dagsskeiðum fyri næmingum í miðnámsskúlunum, og ein eftirmeting varð gjørd av tí arbeiðinum hesi 10 árini.

Til staðar á fundinum vóru eisini manningin, sum hevur staðið fyri dagsskeiðunum, m.a. ferðsluoffur, ambulansafólk, koyrilærarar, politi og onnur.

åTey sum greiddu frá um arbeiði við dagsskeiðunum hesi 10 árini, vóru: Jón Kragesteen, leiðari á Ferðslutrygd, Jan Fossaberg, politistur, Jens Petur Olsen, koyrilærari, Johan Larsen, frá ambulansatænastuni og Heini Festirstein, sum fekk álvarsligan skaða í ferðsluvanlukku fyri umleið 20 árum síðan, greiddi frá um vanlukkuna, og hví hon hendi. Eisini luttók Firouz Gaini, samfelagsfrøðingur.

## Trý fólk heiðrað

Trý fólk, sum hava fingið stóran skaða í feðsluni og hava verið við í hesum arbeiði, vóru heiðrað við gávum á fundinum. Tey vóru: Heini Festirstein í Havn, Herit Joensen í Vestmanna, og Jákup Thomasen í Sørvági. Teirra lagnur hava havt stórt árin á teir umleið 6000 ungdómarnar, sum hava verið á skeiðunum hesi 10 árini, segði Jón Kragesteen, leiðari á Ferðslutrygd.



*Tíðindafundur hjá Ferðslutrygd í sambandi við eitt nýtt átak og eftirmeting av skeiðum fyri miðnámsnæmingum*
*Mynd: Jens Kristian Vang*



*Hesi vórðu heiðrað av Ferðslutrygd, f.v.:Heini Festirstein, Herit Joensen og Jákup Thomasen*

## FAKTA

**Ferðsluvanlukkur raka mest ungdómin**

Tey ungu millum 15 og 24 ár eru 14 prosent fólkatalinum í Føroyum, men eiga 50 prosent av teimum, sum eru deyð í ferðsluni. Oftast eru tað ungir dreingir, sum verða raktir. At so nógv ung eru í álvarsligastu ferðsluvanlukkunum er eitt sereyðkenni fyri Føroyar, tí í hinum Norðurlondunum er tilsvarandi tal um 25 prosent.



*Manningin, sum hevur staðið fyri dagsskeiðunum fyri næmingum í miðnámsskúlunum*